# íð mær sjálvum

eykalykil og fór eftir bilinum hjá mær. Ein vinmaður skuldi við mær suður eftir, men eg koyrdi undan honum. Í tí sambandi kann eg ikki lata vera við at hugsa tankan um hvussu tað hevði verið, um hann var við? Hevði eg kanska ikki koyrt útav, ella um hann hevði verið við og sat í bilinum, so hevði hann kanska ikki verið millum okkum longur. Tað hevði eg ongantíð kunna fyrigivið mær sjálvum.

Men veruleikin er, at eg fór avstað sjálvur, fullur, uttan trygdarbelti, við summardekkum (smáhálka var), og so koyrdi eg eisini alt ov skjótt. Har eru fýra ferðslulógarbrot í einum, og onki av hasum var hent, um eg var edrúur.

Men tá eg so kom suður til Ljósáir, hendi tað. Eg haldi, at eg misti tamarhaldið á bilinum, koyrdi inn í ein klett og var slongdur út úr bilinum. Eg minnist ikki sjálva hendingina, var vekk í fleiri dagar, har eg onki minnist.

Eg kann nevna her at nakað áðrenn hesa vannlukkuna hendi ein onnur vanlukka, ikki so langt fra har sum eg koydi útav. Har doyðu tveir ungir menn, har eg kendi tann eina sera væl. Vit høvdu spælt fótbólt og hondbólt saman í nógv ár. Eg skal lova fyri, at fólk í øllum Sundalagnum vóru sjokkerað av hesi vanlukku.

So kanst tú spyrja, um eg ikki lærdi av hesum. Jú, tað gjørdi eg helst fyrstu tíðina, men eg hevði ikki lært nokk. Gud viti hvat tað er sum gerð tað. Eg haldi, at ung ofta eru naiv í tí aldrinum, og ongin skal siga teimum nakað um hvat er best fyri tey. Hvat er rætt ella skeivt – "eg skal nokk klára meg, fyri meg hendir einki, tig tú" o.s.fr.

Tað er bara so harmiligt at fólk ikki læra av slíkum. Vit vita øll, at ein bilur er ein deyðsfella, um vit ikki bera okkum rætt at í ferðsluni. Og so at koyra fullur, ja hvat skal man siga – vit læra tað tíverri ongantíð – tað er ótrúligt. Vit missa fólk næstan hvørt ár orsakað av kleyvarskapi. Hetta er sera álvarsamt. "Vit mugu læra tað!".



tíðindablaðið Sosialurin

**Álvarsligan skaða í ferðsluóhappi**

Mánanáttina nakað eftir klokkan tvey hendi álvarsligt ferðsluóhapp norðan fyri Ljósá.

Ein 19 ára gamal maður av Eiði kom koyrandi suðureftir, tá hann stutt norðan fyri Ljósá fer eystur av vegnum. Bilurin fór grópandi einar hálvthundrað metrar fram við vegnum, áðrenn hann steðgaði.

Tann ungi maðurin varð slongdur úr bilinum og fekk álvarsligan skaða í ryggin og eisini fekk hann skaða í høvdið. Hann varð fluttur á Landssjúkrahúsið og haðani til Danmarkar mánadagin.

hd

*Hetta stóð at lesa í Sosialinum hósdagin 22. desember 1988*

## Nú sat eg í koyristóli

Men aftur til tað sum hendi. Eg kom á Landssjúkrahúsið í Havn, har læknar søgdu, at einki var at gera. Síðan varð eg fluttur niður á Ríkissjúkrahúsið, og varð lagdur undir skurð tann 21. desember 1988. Eg visti einki um alt hetta, var heilt burtur og minnist als einki.

Minnist bara tá eg vaknaði fleiri dagar seinni, at eg segði við meg sjálvan, "koyr beinini niður". Eg var so "forvirraður" yvir tað sum var hent. Eg kann ikki beskriva hvat fór igjøgnum høvdið hjá mær. Eg lá í einum fremmandum landi við slangum bæði her og der og hevði eina sovorna pínu, at hon als ikki kann beskrivast.

Aftaná eini 7-8 mánaðar á Ríkissjúkrahúsinum kom eg so heim. Tað var ein ótruliga undarlig og ræðulig tíð, helt eg. At koma heim aftur til fólk sum bert kendu meg, tá eg kundi ganga. Nú var eg ikki tann sami at møta á eiðisgøtum sum áðrenn vanlukkuna. Nú sat eg í einum koyristóli, og eg føldi meg nokk so býttan – eg legði merki til at fólk hugdu upp á meg, sum um at eg hevði sligið høvdið í og ikki dugdi at tosa - og hvat veit eg. Eg var tann sami sum áðrenn, eg kundi bara ikki ganga.

Men eg hevði tað ikki gott ta tíðina. Tað var sera hart at koma aftur á gamlar gøtur og ikki kunna gera tað, sum eg altíð hevði gjørt – eg ynskti meg bara vekk, vildi sleppa niður aftur á hospitalið, tí har kendu øll fólkini meg, sum eg var. Eg hevði so nógv felags við øll sum vóru har – og tað var líka sum mín "basi". Eg hevði kontakt við nøkur av teimum fólkunum í langa tíð aftaná. Eg hevði alt til felags við fólkini har – øll vóru komin til skaða upp á nógvar ymiskar mátar, og tey flestu sótu í koyristóli.

## Mín boðskapur

Men stutt eftir eg kom heim aftur til Føroyar, flutti eg til Havnar – kanska eg rann undan – men tað skuldi ikki ganga long tíð, so vildi eg sleppa burtur. Eg fór á háskúla í Jútlandi, bara fyri at vita hvussu sterkur eg var reint sálarliga. Tað var hetta sum fekk meg á glið aftur tann rætta vegin. Eftir 9 mánaðar á háskúla, kom eg aftur til Føroyar í 6 mánaðir.

Síðan flutti eg til Danmarkar, har eg var í eini 6 ár. Eg føldi, at eg var meira anonymur har enn her í Føroyum. Eg fái næstan "forfylgisisvanvid" av t.d. at fara í SMS, ella bara gjøgnum gongugøtuna í Havn: Tað er nokk so irriterandi. Men tað lærur tú eisini at liva við.

Nú havi eg starv hjá Farodane, har eg arbeiði sum grafikkari. Eg stórtrívist har, og føli at uttan hatta arbeiðið var eg ikki nakað. Tað er "superdeiligt" at kunna fara upp til nakað um morgunin, og merkja at man ger nakað til nyttu og kann brúkast.

Eg undirvísi eisini á Ferðlutrygd av og til, har eg sigi 8. flokkum kring landið frá, hvat man ikki skal gera. Sjálvandi vóni eg, at tað hjálpir onkrum.

Mín boðskapur til øll tey ungu er: Hugsið tykkum meira enn einaferð um, tá tit eru rúsaði, latið bilin standa og takið heldur ein taxa. Latið fyri alt í verðini "ikki" ein biltúr gera enda á tykkum. Eg vil ikki at onnur fólk skulu koma í somu støðu sum eg, bara orsakað av kleyvarskapi. Eg kundi verði sloppin undan øllum, um eg bara lat lykilin liggja sunnukvøldið fyri jól í 1988.

Annars er at siga, at eg eri glaður fyri lívið, tá eg hugsi um, hvussu nær eg var við at missa tað.




***Heini Festirstein arbeiðir sum grafikari hjá Farodane í Hoyvík, har hann stórtrívist***